# – Kaotiskur og skeg

Orðini sigur Sjúrður Skaale, tá hann í eini handavending verður biðin um at lýsa vinmannin Jákup Veyhe. Saman hava teir sum framúr skemtarar givið fólki manga stuttliga løtu. Jákup sjálvur lýsir seg sum ein, sum eitur tað sama sum pápin og abbin og hann metir ikki, at tey, sum standa honum næst, halda hann verða so stuttligan. Saman við øðrum ger Jákup ein dogmufilm til nýggjárs



*Jákup starvast við lýsingum og hevur egið virkið. Hann leggur dent á útvarpslýsingar, men tekur sær eisini stundir til at vera leikstjóri og setir leikir upp av og á*

JÓL SKEMTARANS
*Dagfinn Olsen*

Tá sagt verður Jákup Veyhe, so vita tey flestu, hvør talan er um. Verður so lagt afturat, at talan er um skemtaran, so eru øll við.

Jákup Veyhe er maður við mongum dygdum og mongum jørnum í eldinum. Til eina samrøðu um mangt og hvat og jólahugna, er trupult at fáa alt tíðartalvurnar at hóska, serstakliga, tá blaðmaðurin og skemtarin landafrøðiliga eru fjart hvør frá øðrum. Men so er fartelefon hent, men Jákup hevur nógv á skránni, so ikki altíð hóskar.

Einaferð áður hava vit útsett prátið, tí Jákup var biltúr á veg vestur í Vágarnar via nýggja Vágatunnilin við vinmanninum Sjúrða Skaale. Tá vit dagin eftir aftur royna, er sama skilið í bili, men gjørt verður av at práta.

## Egið virki

*Hvør er so Jákup Veyhe?*

- Sonur Jákup Veyhe og abbasonur Jákup Veyhe, sigur Jákup Veyhe, og leggur afturat, at hann er hálvur sandoyingur, og hálvur havnarmaður, sum partvís heldur til í Klaksvík.

Hóast samdir um, at ein ikki spyr, hvussu mong árini eru, so kann avdúkast, at tey eru 32.

Lívsleiðina vil Jákup heldur taka nágreiniliga, tað vil siga ár fyri ár, so vit lata hetta hvíla her. Tó kann sigast, at hann hevur búð í Havn, í Danmark og er aftur nú í Føroyum.

Jákup starvast við lýsingum og hevur egið virkið. Hann leggur dent á útvarpslýsingar, men tekur sær eisini stundir til at vera leikstjóri og setir leikir upp av og á. Seinast kenna vit hann frá samstarvinum við sjónleikarar í Klaksvík. Spurdur, um nakar leikur er á skránni júst nú, svarar skemtarin, at talan bert er um ástarleik.

## Sjálvur skuldina

Jákup er kendur frá mangari kabarett og skemtileikum. Og samstarvið við Sjúrða Skaale undir heitinum Pipar og Salt, sum sent var í Svf, og sum komið er á fløgu, er landskent.

*- Tú ert maður við mongum talentum, tú fæst eisini við tónleik, vit kenna teg frá skemtinum, sangum har, og frá onkrari útvarpsfløgu til dømis?*

- Nei, eg vil ikki kalla meg seriøsan tónleikara. Eg havi fingist við ymiskt, sum tú nevnir, men havi altíð havt góða hjálp, og havi mest fingist við at forrita. Men eg havi fingist við kór og har er kanska talan um meira seriøsitet, sigur Jákup.

*Men hvat heldur Jákup um leiklutin sum skemtari og at verða Jákup, tit vita, skemtarin?*

- Eg veit ikki. Eg haldi ikki, at tey sum kenna meg og eru mær næst, halda meg vera so stuttligan. Men mong kenna óivað andlit mítt frá lýsingum ella leikum, og tí havi eg sjálvur skuldina av, viðgongur Jákup.

Og ferðafelagin í bilinum, Sjúrður, byrjar nú at blanda seg uppí samrøðuna (sambært Jákupi er hetta vegna øvund), so fyri at steðga honum eina løtu afturat, verður hann biðin um at hugsa seg um, fyri at koma við eini lýsing av vinmanninum Jákupi, men bert við trimum orðum.

## Jól: Vit elska at blíva snýtt

*- Hvussu heldur Jákup Veyhe, skemtarin, jól, - sum fólk flest?*

- Ja, tað er siðbundið, ella rættari, ein traditión, sum er komin yvir okkum. Døgurði og gávur. Ikki sperðil ella riv, men dunna. Eg havi eisini hildið jól úti í Hesti hjá systir míni, og tað hevur verið stak hugnaligt, men tá ein nú hevur familju sjálvur, so er tað sum hjá fólki flest, sigur Jákup Veyhe.

*- Ofta verður spurt um afturvendandi spurningin, um jólini eru ov kommersiell, ov nógv av tí góða, um alt ikki druknar í gávum og strongd?*

- Ja, hatta tími eg ikki at tosa um ella svara uppá, sigur Jákup, men heldur fram, tá skemtarin í honum velur at trína fram:

- Kommersielt? Nei, tað er alt ov lítið av øllum hasum, tað kundi gott verið meira, nei tvætl!! Men tað er hugnaligt við krambakøllum, sum hava ymiskt at bjóða. Og vit vita øll, at vøran verður bíligari í januar, men vit elska hatta bedragið, elska at verða snýtt, staðfestir Jákup Veyhe.

Og Sjúrður kemur aftur ímillum við viðmerkingum, sum greitt benda á, at har er ikki keðiligt í bilinum. Við greiðari ábending til ymsar háfloygdar mentanarviðmerkjarar, ið eru frammaliga í fjølmiðlunum, kemur hann við einum monologi um jólini, ið eru alt ov ódekonstruerað og ókommersiel. Og í fartelefon suðinum hvørvur ein monologur, sum vónandi speglast aftur í komandi skemtileikum frá skemtarunum báðum.

Ein roynd verður gjørd at beina prátið aftur á beint:

*- Men Jákup, tíðin til jóla er óivað góð hjá tykkum, sum fáast við lýsingar, ikki so?*

- Eg havi nóg mikið at gera, men eg eri ikki ovbyrjaður. Mær dámar best, tá eg ikki havi so nógvar kundar. Eg vil heldur gera nógv burturúr, sonevndar profil lýsingar. Bert at lesa tilboð upp er ikki júst eg, men sjálvandi geri eg eisini tað av og á, greiðir Jákup Veyhe frá.

Og so biða vit Sjúrð um lýsingina av Jákupi:

- Kaotiskur og skeg, sagt við trimum orðum, sigur Sjúrður avgjørdur.

## Dogmufilm á nýggjárinum

*Men hetta við skemti og leiki leiðir til næsta spurning, sum er, hvat er á tapetinum í løtuni, tí tú gerst okkurt til Svf til nýggjárs, ikki so?*

- Jú, og talan er um ein nýggjan hátt at arbeiða. Vit taka ein dogmufilm upp. Vit fara fimm mans í eitt summarhús. Og við okkum hava vit útgerð, bæði til upptøku og klipp, so alt verður liðugt. So og so nógvir minuttir skulu gerast um dagin og vit hava fastar reglur at ganga eftir, men ikki er gott at vita, hvat hetta endar við, sigur Jákup Veyhe, og leggur afturat, at allir hava fyrireikað seg hvør sær, so einki er endaliga avgjørt frammanundan.

Samrøðan er at enda, Jákup og Sjúrður skemtast víðari á bilferðini, meðan blaðmaðurin ynskir framhaldandi góðan túr og gleðilig jól og Jákup vil fegin enda við at heilsa øllum við ynskjum um gleðilig jól og góða framtíð. Og semja er um, áðrenn fartelefonin tagnar, at skulu vit halda okkum til útvarpsmál, so er heilsanin hervið send og farin.





*Rútmiska Kórið í Hoydølum undir leiðslu av Hans Olivur Joensen*



*Sound of Glory kórið úr KFUM, sum vitjaði til kvøldsetu í Hoydølum*

# Fløvandi sangur og tónleikur í Hoydølum

KVØLDSETA
*Orð og myndir: Jan Müller*

Hvørt heyst skipar Studentaskúlin í Hoydølum fyri kvøldsetu á skúlanum fyri næmingum, foreldrum, systkjum og vinum. Stóra aulain í skúlanum er tá miðdepil fyri ymsum tónleikatiltøkum, upplestri og av og á eisini sjónleiki. Herfyri var so árliga kvøldsetan á skúlanum við tónleiki, mest kórsangi, men eisini instrumentaltónleiki á skránni. Hans Olivur Joensen, tónleikalærari í Hoydølum, var ein av teimum, sum stóð fyri tiltakinum. Hann sigur, at hetta er afturvendandi tiltak á hvørjum ári og er tað nakað, sum dámar næmingunum væl. Tað er so eisini við til at sjóða teir saman undir øðrum umstøðum enn tað teir uppliva vanligar skúladagar. Her er so eisini ein møguleiki at sleppa at framføra tað, sum man tekst við í skúlatíðini ella í frítíðini, fyri einum avmarkaðum áhoyraraskara. Talan er so bæði um flokkar, sum skipa fyri, men har eru so eisini frítíðarbólkar, sum venja í Hoydølum. Skráin fyri slíka kvøldsetu er rættiliga ymisk ári frá ári, tí tað veldst jú nógv um, hvønn tónleik næmingarnir velja. Okkurt árið hevur harður rockur verið á skránni. Hesaferð varð tað meira róligur tónleikur.

Á kvøldsetuni framførdu fleiri kór føroyskar og útlendskar sangir. Har vóru so eisini fleiri tónleikabólkar, har onkur framførdi nýggj løg. Eisini vitjaði eitt stórt kór úr KFUM við fleiri gospelsangum. Úr skránni hesaferð kann nevnast: Ruth og Jenny 02pq, Sparrow (duett, klaver) - 02f/02z, Breaking up is hard to do (Sedaka), kór og orkestur - One Time, Saknur (Hanus Joensen), Lív: klaver, Ebba Sofía: cello og Rani: sang - Chanett og Jóan Petur, Butterfly kisses, Smile, Can you feel the love tonight - 02x, Vem kan segla.... (trad), kór við fagot, violin, bratsch og congas - 02ð, Tears in Heaven (Clapton), kór og klaver - Hástig 2g, Vi kan ikke leve alene, Weather with you og Har du visor min ven - Playmate, Mia (Ragnar, Jóanes og Tróndur) - Sound of Glory, Shackles (Mary Mary), Shout to the lord og Lean On Me - Ívar, Free fallin, Learn to fly og Side (Baldur, Bergur, Eirikur og Niklas) . Rútmiska Kórið í Hoydølum hevði so eisini fleiri framførslur. Aftrat hesum var so eisini upplestur, har eitt nú Øssur úr O1q læs yrkingar eftir Jóanes Nielsen, Janus Djurhuus og Tóroddi Poulsen.

Skipað verður helst aftur fyri eini kvøldsetu tíðliga næsta ár. Rútmiska Kórið skal annars syngja jólasangir í SMS undan jólum umframt seinasta skúladag í Hoydølum, tá nógvur sangur er á skránni. Stóra tiltakið næsta ár verður annars vanliga várkonsertin, sum eisini kann verða víðkað til onnur tiltøk á øllum skúlanum.







*Fleiri tónleikabólkar framførdu nýggj sum eldri løg*